

**Samansparingin - Íløgubólkar**
Samansparingin verður rentað við marknaðarrentu. Veljast kann millum hesar íløgubólkar:

- bert lánsbrøv
- lágt váðastøði (láns- & partabrøv)
- miðal váðastøði (láns- & partabrøv)

Tá ið skipanin verður stovnað, verður øll samansparingin sett í lánsbrøv, um ikki annað er avtalað. Avkastið verður tilskrivað mánaðarliga, og kann limurin tí broyta íløgubólk tann 1. í einum mánaði. Hetta skal fráboðast mánaðin frammanundan. Tað er ókeypis at broyta íløgubólk.

Í sambandi við íløgupartin verður víst til heimasíðuna www.betri.fo

Um limur doyr í inngjaldingarskeiðnum, verður samanspart virði útgoldið teimum eftirsitandi.

**Ú-dagurin**
Limir, sum rinda inn árliga kr. 18.000,- ella meira til Betri pensjón, fáa 20% avsláttur av øllum privatum tryggingum hjá Tryggingarfelagnum Føroyum. Uppgjørt verður fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember. Avslátturin verður útgoldin í kekki í januar mánaði árið eftir.

Um so er, at limurin hevur hjúnafelaga ella sambúgva*, og hesin hevur privatar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum, eru eisini hesar tryggingar fevndar av avsláttarskipanini.

* Sambúgvi er persónur, ið livir í føstum hjúnabandslíknandi parlagi við tryggingartakaran. Tað er ein treyt, at sambúgvin - sambært Landsfólkayirlitinum seinastu 2 samanhangandi árini - hevur havt sama bústað sum tryggingartakaran.

**Gjølligari greinan**
Víst verður til heimasíðuna hjá Betri pensjón www.betri.fo og heimasíðuna hjá Føroya Skipara- & Navigatørfelag www.fsn.fo

Betri pensjón, januar 2010

Kongabrúgvin, Postsmoga 329, 110 Tórshavn,
Tel 345 700, Faks 345 601, betri@betri.fo, www.betri.fo

Betri pensjón

# Pensjónsskipan



## fyri limir hjá

## Føroya Skipara- & Navigatørfelag



## Pensjónsskipan fyri limir hjá Føroya Skipara & Navigatørfelag



Føroya Skipara- & Navigatørfelag hevur gjørt pensjónsavtalu við Betri pensjón. Hetta merkir, at limir nú hava møguleika fyri at velja Betri pensjón sum pensjónsveitara.

**Innliman**
Limurin setur seg í samband við Betri pensjón. Við innliman tekur limurin støðu til, hvussu skipanin skal setast saman. Limurin fær eitt tryggingar- og kontonummar, sum hann gevur víðari til reiðaran. Hetta verður síðani viðmerkt í flytingini, tá reiðarin flytur eftirlønar-gjaldið.

**Heilsuspurningar**
Við innliman svarar limurin heilsuspurningum, sum verða latnir Betri pensjón til støðutakan.

Fevnir pensjónsavtalan einans um samansparing og gjaldsundantøku, kann avtalan góðtakast, uttan at limurin svarar heilsuspurningum. Hetta er galdandi, um limurin hevur gildiga heilsuváttan fyri sjófólk (Bláu bók).

**Pensjónsgjald**
Samlaða pensjónsgjaldið verður inngoldið av reiðarínum í sambandi við lønarútgjalding. Limir kunnu eisini velja sjálvir at gjalda inn til pensjónssamansparing, afturat ásetta eftirlønarinngjaldinum. Avtalað verður gjørd við reiðaran um, at hesi gjøld verða flutt til Betri pensjón saman við sáttmálasetta eftirlønargjaldinum.

**Samansparing**
Samansparingin verður útgoldin tann 1. í mánaðinum, eftir at limurin hevur fylt 67 ár.

Inngjaldið verður í fyrstu atløgu nýtt til **”Eftirløn í einum”**. Inngjaldið til henda partin kann tó ikki fara upp um ásetta hámarkið fyri inngjøld til kapitaleftirløn. Hámarkið er ásett í Rentutryggingarlógini og verður dýrtíðarviðgjørt.

Inngjøld omanfyri nevnda hámark til kapitaleftirløn verða nýtt til eina **”Eftirløn í lutum”**, sum verður útgoldin í 10 ár. Útgoldið verður í mánaðarligum veitingum, fyrstu ferð tann 1. í mánaðinum, eftir at limurin er farin frá við eftirløn.

Limir hava eisini møguleika fyri at nýta samansparingina ella part av samansparingini til eina **”Eftirløn alt lívið”**. Útgoldið verður í mánaðarligum veitingum. Útgjaldið byrjar tann 1. í mánaðinum, eftir at limurin hevur fylt 67 ár, og stendur við, so leingi limurin er á lívi.

**Samansparing undir FAS-skipanini**
Fyri limir, sum sigla undir FAS, er ásett í lønarsáttmálanum, at reiðarin flytur gjøld fyri limin av skattaðum peningi. Inngjaldið verður nýtt til eftirløn, sum verður útgoldin í einum. Peningurin verður inngoldin til eina pensjónssamansparing, uttan rætt til skattafrádrátt. Sostatt skal ikki rindast avgjald sambært rentutryggingarlógini, tá útgoldið verður. Tá gjaldið verður flutt, er álagt reiðarínum at boða Betri pensjón frá, at talan er um inngjald undir FAS-skipanini.

**Tryggingar**
Afturat samansparingini kunnu limir eisini velja at tekna lívs- og óarbeiðsføristrygging. Hesar upphæddir koma afturat tryggingarupphæddunum í samlagstryggingini, sum Føroya Skipara- & Navigatørfelag hevur teknað fyri sínar limir.

**Gjaldsundantøka**
Pensjónsskipanin verður stovnað við rætti til gjaldsundantøku. Hetta merkir, at um limur gerst 2/3 óarbeiðsførur, rindar Betri pensjón framhaldandi tryggingargjaldið, t.v.s. bæði til eftirlønarsamansparingina og fyri møguligar váðisdekningar. Treytin fyri, at tryggingin fevnir um gjaldsundantøku, er, at limurin ikki er fyltur 60 ár, tá óarbeisðførið rakar.

**Tilskilan**
Um ikki annað er avtalað, verður - í sambandi við deyða - goldið út til næsta avvarðandi. Ynskir limur,at gjaldast skal út til annan navngivnan persón, skal hetta fráboðast Betri pensjón skrivliga.

**Skattur**

Útgjøld í einum:

- goldið við óskattaðum peningi - avgjald sambært rentutryggingarlógini.
- goldið við skattaðum peningi - skattafrítt útgjald

Stigvís útgjøld:

- skattað sum A-inntøka.

**Net-pensjón**
Við innliman fær limurin eitt loyniorð, soleiðis at hann umvegis heimasíðu okkara www.betri.fo hevur atgongd til upplýsingar, sum knýta seg til tryggingaravtaluna hjá liminum.

Almennar tryggingartreytir, sí www.betri.fo

Tryggingartreytir fyri Bráðsjúkutrygging, sí www.betri.fo